Nr. 44

# Náttúrunnar megi

Eg vaknaði klokkan hálvgum sjey. Eg lat meg í og tók tey ellivu neyðugu fetini frá sovikamaranum til køkin. Her gjørdi eg mær ein sterkan kopp av kaffi og koyrdi tveir sukurmolar og eitt vet av haldbarari mjólk í. Gjøgnum vindeygað sá eg havið við teimum bláu, buldrandi bylgjunum, sum sýndust mær munandi kraftigari enn vanliga. Eg fór út gjøgnum hurðina og spákaði eftir vegnum og teimum í alt níggju húsunum, sum vóru á hesari síðuni av bygdini: mítt var tað einasta, sum nakar búði í. Hinu megin ánna vóru nøkur hús aftrat, har ein bóndi búði. Hann grenjaði altíð um, at onkur ær var burturi.

Eg fór túrin fram við fjallinum, sum í dag var merktur av ljóðinum frá teimum óvanliga larmandi bylgjunum. Tá eg kom heim aftur, fekk eg mær nakrar dósir av tun og vatn afturvið. Síðani fór eg oman í ánna at fiska. Har var eingin fiskur í hesi ánni, men mær dámdi so væl at sita her. Síðani fór eg heim aftur og fekk mær nakrar dósir av tun aftrat. Hareftir legði eg meg at sova klokkan níggju. Soleiðis hevur dagurin hjá mær sæð út, síðani eg bleiv pensioneraður fyri ellivu árum síðani.

Ein dagin broyttist lívið hjá mær tó fullkomiliga. Eg hevði verið í býnum fyri at fylla mína goymslu av dósumat og haldbarari mjólk upp. Tað var fýra mánaðir síðani, eg hevði verið her, og einar tríggjar vikur síðani, eg hevði verið noyddur at tosað við nakran persón yvirhøvur. Tá eg kom aftur, sá eg, at hurðin stóð opin. Har var okkurt ljóð innanfyri, og eg gekk spakuliga inn um gáttina, har eg væntaði at síggja ein tjóv ella okkurt tílíkt. Ístaðin bleiv eg møttur av tí vakrastu kvinnuni, eg hevði sæð í mínum lívi; og kvinnan var nakin. Hon hevði langt hár, blá eygu og eina náttúrligheit, sum mær dámdi ótrúliga væl; hon var óvanliga hárut. Allastaðni. Summir menn høvdu kanska hildið hetta verið andstyggiligt, men eg má viðganga, at eg kendi eina sterka girnd mótvegis henni í somu løtu, eg legði eygu á hana. Eg tók nøkur fet fram og varnaðist ein kraftigan anga av bøi; hetta mátti helst vera ein bóndagenta, tó eg ikki visti um nakra, sum búði í nánd.

Ein vaksandi tøgn, ið vantaði orð, spreiddi seg millum okkara, har hon eygleiddi meg, og eg hugdi eg beint inn í hennara vøkru, bláu eygu. Aftan á eina løtu fekk eg kensluna av, at tað var eg, sum burdi sagt okkurt, hóast hon var tann fremmandi, ið stóð nakin í mínum heimi. Eg royndi at siga okkurt, men hvørja ferð eg opnaði munnin, komu eingi orð fram. Hóast hetta var ein undarlig støða, sum eg ikki hevði kunnað gjørt nakað við, bleiv eg nervøsur og visti ikki, hvat eg skuldi siga. Hetta fekk meg at hugsa um tær óteljandi ferðirnar, eg hevði verið avvístur av kvinnum og hevði verið troystaður í føvninginum á mammu míni.

So langt aftur sum eg minnist, havi eg altíð havt trupulleikar við at tosa við konufólk. Eg eri vaksin upp í tí sama húsi, sum eg búgvi í nú, og tískil hevði eg ikki nógv samband við onnur børn, til eg fór at ganga í skúla. Sum árini liðu, fekk eg nakrar fáar dreingjavinir, men genturnar hevði eg ongantíð samband við. Tað sýndist, sum tær hildu meg vera snedigan og øðrvísi, og tær tímdu ongantíð at fáast við meg. Øll míni tannár megnaði eg enn ikki at mussa eina einasta gentu, ikki eingongd á kjálkan; burtursæð frá mammu mín, sjálvandi.

# Náttúrunnar megi

Konufólk hava altíð hugtikið meg. Mær hevur altíð dámað at eygleitt tey, nomið við tey og luktað til tær, um eg kom nóg tætt at teimum. Tað vóru tó bert fáar ferðir, at eg var nóg tættur at einum konufólki til, at tað ikki varnaðist meg. Tí var tað heldigt, at eg altíð kundi fara til mammu mína, um eg hevði trupulleikar av nøkrum slag. Eg havi mangan verið í føvningum á mammu míni, havi hildið um hana, eygleitt hana, luktað til hana. Hetta hevur altíð sissað meg. Eg minnist eina hending í 9. flokki, har ein genta hevði rópt eftir mær, tí at eg hevði følt upp á rumpu hennara. Tá eg kom heim, fortaldi eg mammu míni hendingina. Hon var skjót sum vanligt at ugga meg og taka bróstið fram. Minnið av hesi søtu, kremuti vætuni megnar altíð at mana eina deiliga kenslu fram í kroppinum á mær; hon elskaði meg veruliga.

Heldur ikki seinni í lívinum hevði eg eydnuna við mær. Ikki ein tann einasta vildi vera saman við mær, og tí er støðan tann, at eg enn eri jomfrú. Eg føldi hendurnar ristast og sveittan renna eftir rygginum, tá eg stóð framman fyri hesa vøkru kvinnu.

Men knappliga føldi eg ein sterkan impuls, sum eg ikki kundi kempa ímóti. Eg føldi meg drignan at henni, og ein dýrisk trá hertók meg. Eg tók nøkur fet fram í móti henni og hugdi allatíð beint inn í hennara djúpu, bláu eygu. Hon segði einki, men eg kendi á henni, at hon eisini vildi hava meg. Eg lat meg skjótt úr og stillaði meg aftan fyri hana. Tá vit sameindust, fyltu ljóð av njóting alt rúmið, og ikki bar til at skilja millum, um tað var hon ella eg. Eg føldi meg sum eitt dýr, sum mátti geva eftir fyri náttúrunnar megi, og samstundis føldi eg meg so nógv sum mannfólk sum ongantíð áður.

Knappliga brast hurðin upp aftan fyri meg, og eg hvakk við. Bóndans orð raktu meg sum pískasløg: “Hvat helviti gert tú við ærini hjá mær?”